Klaksvíksleiðin:

# Alsamt fleiri ferðandi

**Alsamt fleiri ferðandi nýta busssambandi millum Klaksvíkina og Havnina, og tað hendir seg næstan ikki, at bussurin koyrir tómur. Og tað eru eisini tey, sum eru so mikið at sær komin, at tey koyra sjálvi úr Havn til Gøtu, og taka bussin til Klaksvíkar, so tey sleppa undan tunnilsgjaldinum**



*Líggjas Blábjørg sigur, at alsamt fleiri gera brúk at Klaksvíksleiðini*
*Mynd Rólant Waag Dam*

BUSSFERÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Bussførarin henda morgunin vit koma upp í bussin, er fuglfirðingurin Líggjas Blábjørg. Við í bussinum eru knappliga 20 ferðandi, men tað er ógvuliga ymiskt hvussu nógv fólk eru við fortelur Líggjas: – Síðsta mánadag, tá eg fór úr Havnini hevði eg 42 ferðafólk við í bussinum, men av teimum fór bara ein til Klaksvíkar. Dagin eftir hevði eg tann eina túrin 30 ferðafólk við úr Havn, og tey komu øll við til Klaksvíkar. Tað vísir seg at vera rættiliga ymiskt, hvussu nógv fólk eru við, men tað eru næstan altíð onkur, sum skal allan vegin norður, sigur hann og vísir á, at hann hevur tosað við hinar bussførararnar á leiðini, og teir halda at ferðafólkatalið er støðugt vaksandi.

– Eitt sum eg havi lagt merki til er, at fleiri fólk sum koma sunnani frá koyra norður til Gøtu ella Leirvík, har tey seta bilin og so taka bussin víðari. Tað kostar jú bara 20 krónur við bussi haðani at koyra har frá til Klaksvíkar, og so sleppa tey undan at gjalda fyri at fáa bilin tvørtur um, greiðir Líggjas Blábjørg frá.

### Vánalig skelting

Í Leirvík koyra vit ikki oman á ferjuleguna, sum bussarnir annars hava gjørt. Vit sneiða til høgru áðrenn vit koma oman í sjálva bygdina og hava beina kós móti tunlinum. Men tað er ikki meiri enn mann akkurát ber eyga við lítla skeltið, sum vísir á hvønn veg tað skal koyrast, fyri at finna tunnilin. So eg spyrji Líggjas, um hann ikki heldur, at skeltingin til tunnilin er ov vánalig. Líggjas svarar og sigur, at tað heldur hann, men at tað galdandi fyri Føroyar sum heild: - Tað er ikki lætt at vera ferðafólk við bili í Føroyum. Tá er munur á at uppmerkingin er betri uttanlands, sigur hann.

### Svøvntungir næmingar

Komin til Leirvíkar vakna tvey sum við kaldan dreym afturi í bussinum. Tað vísir seg, at hetta vóru næmingar, sum skuldi av á Kambsdali, men eru sovnaðir og tí endaðu í Klaksvík í staðin fyri á Kambsdali. Nú var klokkan hálvgum tíggju, og bussurin fór ikki úr aftur Klaksvík fyrr enn klokkan tólv, og teir báðir svøvntungu næmingarnir er púra ráðaleysir. Men so er tað, at bussførarin forbarmar seg yvir tey, og sigur hann kann koyra tey inn á Kambsdal, nú hann hevur eina pausu.

Nú er túrurin at enda komin, men áðrenn eg fari av spyrji eg bussføraran, hvussu honum dámar at koyra til Klaksvíkar. – Mær dámar væl, men eg sakni eitt bussskýli. Umstøðurnar at halda pausu í vóru betri í Fuglafirði, men tað er helst nakað sum kemur við tíðini, heldur bussførarin Líggjas Blábjørg, sum í dag nýtti kaffisteðgin hjá sær, til at koyra koyra næmingar inn á Kambsdal, sum høvdu forsovið seg.

## Vit fara á Norðoyastevnu

Tey vóru ikki mong, ið høvdu valt at taka bussin norður til Klaksvíkar henda týsmorgunin Sosialurin var við. Men millum teirra vóru teir hvalvíkingarnir Høgni Olsen og Walter Olsen, sum báðir ganga á SIT í Klaksvík. Vit fingu okkum eitt prát við teir, og spurdu hvat teimum dámar at koyra allan vegin norður?

– Jú hetta er bara ófert, men vit sakna eisini Dúgvuna viðhvørt. Í bussinum er deiliga friðarligt, men til tíðir í so friðarligt. Tá sakna vit kortspælini umborð á Dúgvuni, og tosi sum var umborð. So hóast túrurin er vorðin munandi styttri, so fellur tíðin av og á longri nú vit koyra allan vegin.



*Høgni, vinstrumegin, og Walter, høgrumegin, ætla sær báðir á Noroyðastevnu*
*Mynd Rólant Waag Dam*

*Fara tit á Norðoyastevnu?*

– Tað er planurin. Norðoyastevnu hevur ein altíð hug at fara til, so tað rokna vit við. Nú er eisini eini tvey ella trý ár síðani vit vóru, so tað má vera tíð uppá. Nú kunnu vit so koyra allan vegin, og sleppa undan at passa okkum upp til ferjuna, so tað ger tað munandi hugaligari at fara.

**RWD**

## Gunvá setur stevnuna

Fríggjakvøldið verður Norðoyastevnan sett í Vágstúni. Í ár verður tað forkvinnan í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar Býráði, sum fer at seta stevnuna. Gunvá við Keldu heldur stutta røðu í sambandi við setananin, sum verður frá kl. 19.30 fríggjakvøldið.

## Teir fremstu telva

Norðoyastevnuaftan verður talvdystur í millum Klaksvíkar Talvfelag og Havnar Telvingarfelag. Hetta er ein talvdystur, sum plagar at verða hildin á Norðoyastevnu, og soleiðis verður eisini í ár. Júst hesi bæði talvfeløgini hava í nógv ár verið tey fremstu í landinum, og tí er altíð spennandi, tá ið bestu liðini hjá teimum telva ímótu hvørjum øðrum. Telvað verður í Skákinum frá klokkan 19.00.

## Hornorkestrið hevur konsert

Klaksvíkar Hornorkestur plagar at seta dám á til almenn tiltøk í Klaksvík, og soleiðis er eisini á Norðoyastevnu, tá ið orkestrið spælir til fólkafund, midnáttarsamkomu og setanina av Norðoyastevnu. Leygarkvøldið klokkan 23.30 fer Klaksvíkar Hornorkestur at hava konsert í Vágstúni, og her ber til at hoyra tónleik, ið orkestrið hevur vant og spælt gjøgnum árini.